
Poul Ørum



Kendi danski rithøvundurin Poul Ørum er deyður á 78 ári, f. 1919. Ein teirra, sum tíðum gjørdi vart við seg, og sum við bókum sínum ella sum røðari ríkaði danska mentunarheimin.

Hann skrivaði mest um smámannin. Sum ungur tókst hann við fyrifallandi arbeiði, torvagravi, sum tað har kallaðist, var eitt skifti á sjónum, matrósur til hann fór á A-pressuna sum blaðmaður. Um hetta mundið var tað, at hann av álvara fór at skriva. Tá tað so bar til at liva av tí, hann skrivaði av bókum, slepti hann blaðmannastarvinum.

Fyrsta bók hansara kom í 1953 og nú gjørdist hann kendur rithøvundur, m.a. við bókini »Natten i venteværelset«.

Í 1980 doyði fyrra kona hansara, tá er tað hann skrivaði »Ravnen mod aften« og »Sorgens følelser«, aftaná hesar útgávur var hann nógv brúktur sum fyrilestrahaldari. Var altíð í parti við tí minni menta, og tað er hetta støðufesti, sum merkti alla skriving hansara.

Tað eru tey, sum minnast hansara stóru luttøku í málinum um evnaveika Jacob Brølling, sum hevði fingið dóm fyri seksualmorð á Norðursælandi. Signa og Poul Ørum skrivaðu bókina »Gykl rættartrygdarinnar – greinan av órættvísum dómi«, eitt úrslit av granskan teirra av hesum máli.

Poul Ørum fekk frá hondini 40 bókaverk og var heiðraður við tveimum heiðursgávum, Mentunarheiðursgávan hjá LO og Kritikerprisen. Poul Ørum gekk sínar egnu leiðir.


Eftir rithøvundan Poul Ørum stendur eftirmæli um rithøvundan við mannavitsku, hann, sum segði sína hugsan, hart og skart.


i.

PSYKOTERAPI

Hevur tú hug til at arbeiða psykoterapeutiskt við tíni egnu persónligu menning í bólki saman við øðrum fólkum, ert tú vælkomin at ringja til mín at frætta meira. Nýggir bólkar byrja í januar mánaði. Bólkastødd umleið 6 fólk. Ætlanin er at hittast annaðhvørt mánakvøld frá kl. 18–22 og 10 ferðir fram.

Anna Debes Hentze, psykologur
Eg eri vanliga at hitta eftir kl. 18
Tlf. 16608 / 84533





KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Beinta L. Rasmussen
á Frælsinum 4
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: MIRKJALLI

B	Ó	K	H	V	E	I	T	I	G	R	E	Y	T	U	R
U	L		E		T	E			A	I	M	E	E		E
R	A	D	I	S	A		L	O	P	P	U	N	I		Y
G		O	M	A	N	L	O	P		A			R	A	Đ
A	N	N	A	M	O	S	T	I	R		A	V	R	I	K
R			V		L				Á	H	U	G	I		Á
A	U	B	E	R	G	I	N	A		V	E			S	L
B	L	A	Đ	S	E	L	L	A	R	Í		H	S	V	
O	K	U	R		R	J			O	T		U	T	A	H
L	A	D	U		Đ	U		H	A	L	D	G	Ó	Đ	U
L	N		R	S		S	S		L	E	A		Đ		G
A		A		O		H	I		D	Y	G	G		D	L
R	U	G	U	R		I	Đ			K	U	T		O	O
141	P	A	S	T	I	N	A	K	K	U	R		U	R	T
S	S	V		N	A		N	Ø	T	R	I	L	S	I	
T	I	E	N	A	N	M	I	N			N	O	T	A	N

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi høsdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: 142

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.